# Ritan er best



Mynd: Jens Kr. Vang



*Væl liggur fyri at manerera við Silju Star í Nólsoy eins og aðrastaðni kring landið. Við skiparanum Hanus Jógvansson Durhuus eru ferðafólkini í tryggum hondum*

Mynd: Jens Kr. Vang




*Hóast summarið er farið eru kortini nøkur ferðafólk eftir her á landi. Her vitja nøkur norsk ferðafólk í Nólsoy*

Mynd: Jens Kr. Vang

bygdarfólkið helst eisini gjørt.

Mong ymisk ynski og krøv verða sett einum slíkum skipi. Tað skal so í øllum førum ikki vera verri ella minni enn tann loysnin, sum teir hava kent seg tryggar við í 35 ár.

Sum nólsoyingur hevur Jeanne sjálvandi eisini gjørt sær sínar hugsanir um, hvussu ferðasambandið skal røkjast til heimbygd hennara í framtíðini.

## Eitt sum Teistin

Fyri Jeanne er tað týdningarmikið, at skipið hjá nólsoyingum er sjógott, soleiðis at børn og vaksin kunnu kenna seg trygg umborð, nú og í framtíðini.

Henda nýggja ferjan skal helst kunna sigla eins skjótt og Silja Star, og skal haraftrat kunna taka størri og smærri bilar.

- Eg haldi faktiskt, at vit skuldu fingið eitt skip av sama slagi sum Teistin, ið siglir um Skopunarfjørð. Ein slík ferja hevði verið hóskandi til okkum.

- Hon skal sjálvandi vera nakað minni enn Teistin, soleiðis at hon hóskar til okkara tørv herúti. Men mær dámar sera væl, soleiðis sum Teistin er innrættaður og skipaður, slær Jeanne fast.

> *Silja er eitt gott skip og siglir haraftrat skjótt. Men eg loyvi mær at ivast í, hvussu skilið hevði verið um veturin*